




*Poul Ennigarð, verjuleikari hjá oddaliðnum í Vodafonedeildini, ÍF. Í gjár vunnu teir 3-1 á útivølli ímóti grannunum, Víkingi.*

**Hvussu følist tað at vera oddalið?**
- Tað er ein góð kensla. Men vit hava enn bara spælt 2/3 av kappingini, so tað eru nógvir dystir eftir.

**Hvussu var lagið eftir dystin?**
- Tað var sera gott lag í umklæðingarrúminum. Allir vóru sera glaðir um henda sigurin.

**Er tað ein serlig kensla av vinna júst á Víkingi *- eg meini, tú ert jú sjálvur úr Syðrugøtu?***
- Tað kanst tú ætla, at tað er nakað serligt at vinna á Víkingi. Vit fáa sjálvandi nógv skot, tá vit tapa og teir vinna. Men í gjár fingu vit líkasum "hevnd" fyri tapið í steypakappingini

**Hvat siga fólk um tykkara lið?**
- Eg arbeiði saman við nógvum NSÍ-fjepparum *(í náttúru-barnagarðinum Víkin í Æðuvík)*, og her er nógv tos um fótbólt. Ikki minst nú, ið vit skulu spæla næsta dyst júst ímóti NSÍ!

# Bjarnatænasta




Jóhannarnir báðir, Hot og Kul, vitja oljuvinir í Moskva

## Í DAG




Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi ella norði, skiftandi skýrák, men mest skýggjað við ælingi av og á, møguliga vátaslettingur ella heglingur í støðum, serliga á fjøllunum. Hitin millum 3 og 6 stig.

## MIKUDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, móti kvøldi gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi. Fyrst skýggjað og sum fráliður regn, men móti kvøldi slítur í og mest turt. Hitin millum 5 og 8 stig.

## HÓSDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi sum snarar í ein norðan og útnyrðing og minkar niður í lot til andøvsgul, út á náttina lítið lot av ymsum ættum, undir 5 m/s. Mest skýggjað og fyrst turt, men út á kvøldið regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur strekkir seg frá Eysturgrønlandi í ein útsynning vestan fyri Ísland, meðan eitt lágtrýstøki yvir Norðurlondum sendir lágtrýst niður yvir Føryar úr einum landnyrðingi. Køld luft streymar frá útnyrðingi og norði inn yvir Føroyar.




Mikudagin flytir eitt lágtrýst seg frá Vesturnoregi í ein vesstan og útsynning móti Skotlandi og víðari í ein landsynning. Seinni í vikuni kemur ein hátrýstryggur inn yvir Føroyar av vestri.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 6 | Tromsø | 4 | Moskva | 19 | Athen | 24 |
| Reykjavík | 10 | Bergen | 8 | Berlin | 15 | Beijing | 22 |
| Tórshavn | 3 | Oslo | 11 | Paris | 16 | New Dehli | 38 |
| Lerwick | 5 | Stokkhólm | 8 | Madrid | 16 | Bangkok | 38 |
| Aberdeen | 10 | Keypmannah. | 8 | Róm | 19 | Sydney | 23 |
| London | 9 | Helsinki | 4 | Malorca | 21 | New York | 11 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

20. mai Mánin næstur jørðini
21. mai Fyrra kvarter
28. mai Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. mai | 05:07 | 17:32 | 04:07 | 16:32 | 04:22 | 16:47 | 07:07 | 19:32 | 08:07 | 20:32 | 03:22 | 15:47 |
| 26. mai | 05:57 | 18:22 | 04:57 | 17:22 | 05:12 | 17:37 | 07:57 | 20:22 | 08:57 | 21:22 | 04:12 | 16:37 |
| 27. mai | 06:47 | 19:14 | 05:47 | 18:14 | 06:02 | 18:29 | 08:47 | 21:14 | 09:47 | 22:14 | 05:02 | 17:29 |
| 28. mai | 07:41 | 20:07 | 06:41 | 19:07 | 06:56 | 19:22 | 09:41 | 22:07 | 10:41 | 23:07 | 05:56 | 18:22 |
| 29. mai | 08:34 | 21:00 | 07:34 | 20:00 | 07:49 | 20:15 | 10:34 | 23:00 | 11:34 | - | 06:49 | 19:15 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. mai | 02:22 | 14:47 | 05:22 | 17:47 | 06:22 | 18:47 | 04:52 | 17:17 | 06:07 | 18:32 |
| 26. mai | 03:12 | 15:37 | 06:12 | 18:37 | 07:12 | 19:37 | 05:42 | 18:07 | 06:57 | 19:22 |
| 27. mai | 04:02 | 16:29 | 07:02 | 19:29 | 08:02 | 20:29 | 06:32 | 18:59 | 07:47 | 20:14 |
| 28. mai | 04:56 | 17:22 | 07:56 | 20:22 | 08:56 | 21:22 | 07:26 | 19:52 | 08:41 | 21:07 |
| 29. mai | 05:49 | 18:15 | 08:49 | 21:15 | 09:49 | 22:15 | 08:19 | 20:45 | 09:34 | 22:00 |